## Ferðamannaskip selt



Norska reiðaríið Color Line hevur selt amerikanska felagnum Celebration Cruise ferðamannaskipið "Prinsesse Ragnhild" fyri 180 milliónir norskar krónur. Skipið, sum liggur í Sandefjord, skal latast nýggju eigarunum tann 1. oktobur. Amerikonsku eigararnir ætla at umbyggja "Prinsesse Ragnhild" eitt sindur, og skipið fer so at sigla við ferðafólki í Karibiska Havinum. Tað skal hava støð á Bahamas. "Prinsesse Ragnhild" er bygd í 1981. Skipið hevur yvirhøvur siglt millum Oslo og Kiel í Týsklandi, men onkur tíðarskeið hevur tað siglt millum Oslo og Hirtshals og millum ymsar havnir í Vesturnoregi, skrivar Aftenposten. "Prinsesse Ragnhild" er tað fimta skipið, sum Color Line hevur selt tey bæði seinastu árini.

# Fíggingarstovnurin hevur eisini ábyrgd



**- Vit hava latið fíggingarstovnin vita, at talan er um eina støðu, sum er rættiliga álvarsom. Vit halda, at stovnurin, sum fíggjar verkætlanina, eigur at taka eina ávísa ábyrgd av teimum avleiðingum, sum verkætlanin hevur havt við sær fyri fleiri sjófólk úr øðrum landi, sigur formaðurin í Føroya Skipara- og Navigatørfelag**

TOPAZ
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*- Tað gevur onga meining at hanga reiðaran Bjarta Mohr út. Tað, sum nú ræður um, er at finna eina sømiliga loysn fyri fiskimenninar, so hesir kunnu fáa tað, teir eiga til góðar, sigur Eyðstein Djurhuus*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Síðan málið um verksmiðjutrolaran Topaz, sum liggur í Las Palmas á Grand Kanariu, tók seg upp, hava føroysku manningarfeløgini og onnur tikið málið upp fyri at vita, hvat gerast kann fyri at hjálpa manningini úr teirri kreppu, hon er komin í.

Skipið er undir føroyskum flaggi, men útlendska manningin er ikki limur í føroyskum feløgum. Kortini hevur reiðari, sum hevur skip undir føroyskum flaggi, ymiskar skyldur sambært lógini um trygd á sjónum og sjólógini.

Tey trý manningarfeløgini, Føroya Skipara-og Navigatørfelag, Maskinmeistarafelagið og Føroya Fiskimannafelag, hava tosað saman um trupulleikarnar og ein teirra, sum hevur havt ein týðandi leiklut í málinum, er formaðurin í FNS, Eyðstein Djurhuus.

- Eg frætti fyrstu ferð um viðurskiftini um ólavsøkutíð. Tá setti umboðsmaðurin hjá altjóða felagsskapinum ITF seg í sambandi við okkum. Hesin segði, at teir høvdu trupulleikar við at fáa fatur á reiðaranum, Bjarta Mohr. Eg setti meg tá í samband við Bjarta, sum segði seg royna at loysa málið.

Eyðstein sigur, at næsta stigið var at seta seg í samband við teir í Føroyum, sum fíggja Topaz-verkætlanina.

- Vit lótu fíggingarstovnin vita, at talan er um eina støðu, sum er rættiliga álvarsom. Vit hildu, at stovnurin, sum fíggjar verkætlanina, eigur at taka eina ávísa ábyrgd av tí, sum er farið og fer fram millum reiðaran og verkætlan hansara – við teimum avleiðingum, sum hetta hevur havt við sær fyri fleiri sjófólk úr øðrum landi.

Eyðstein sigur, at fíggingarstovnurin ikki var serliga hugaður at tosa við felagið um ávísar verkætlanir, sum teir hava við viðskiftafólk.

- Vit hildu í hvussu er, at fíggingarstovnurin átti at vita, hvussu vorðið er, sigur hann.

Formaðurin í Føroya Skipara-og Navigatørfelag sigur, at felagið síðan vendi sær til føroysku myndugleikarnar á økinum, og í hesum førinum er talan um Skipaeftirlitið.

- Sambært lógini um trygd á sjónum og sjómanslógini eru ávísar treytir, sum ein føroyskur reiðari hevur skyldu til at fylgja. Talan er eitt nú um, at manningar hava krøv um sømiligar arbeiðsumstøður, kost-og nøktandi heilsuumstøður. Vit lótu Skipaeftirlitið vita, at manningarfeløgini, sum hava havt samband við sjófólkini umborð á Topaz, ikki eru trygg við umstøðurnar og viðurskiftini hjá manningini.

Eyðstein Djurhuus sigur, at feløgini eisini hava havt beinleiðis samband við onkrar av manningini umborð á Topaz.

- Vit hava tosað við umboð fyri manningina um, hvørjir møguleikar eru, og hvørji stig kunnu takast.

Hann vísir á, at tá sjómenninir umborð á Topaz ikki eru limir í føroyskum feløgum, er avmarkað, hvat feløgini kunnu gera fyri teir.

- Vit hava eitt nú víst á, at altjóða felagsskapurin ITF, sum hevur umboð í Las Palmas, kann "arrestrera" skipið og vísa til føroysku sjólógina, og tá verða tað hýrukrøvini, sum fáa fyrsta prioritet.

Eyðstein Djurhuus vísir á, at talan er um ein reiðara, sum er komin í knýpi, og sjálvur dugir hann onga meining at síggja í, at Bjarti Mohr verður úthongdur og dálkaður.

# Hava biðið um hýru síðani í mai

**- Vit vilja hava okkara løn, so vit kunnu sleppa heim at forsyrgja okkara familjum, sigur Vadim Nepocrjtj, telegrafistur umborð á føroyska skipinum Topaz við útvarpið hjá Kringvarpinum**

TOPAZ
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Telegrafisturin sigur, at fólk umborð á Topaz hava verið so ill, at ætlanir onkuntíð hava verið um at gjørt seg inn á skipið og útgerð umborð.

- Eg eri skuffaður og dugi ikki at seta orð á mínar kenslur.

Vadim Nepocrjtj er saman við 41 øðrum sjófólkum umborð á føroyska skipinum Topaz, sum hevur ligið við kai í Las Palmas síðstu 11 mánaðirnar.

Við útvarpið hjá Kringvarpinum sigur telegrafisturin, at hann hevur konu og tvey børn í Ruslandi og bíðar framvegis eftir lønini, sum hann skal brúka til at forsyrgja familju síni við.

Konan er nú noydd at læna pengar frá familju og vinum fyri at yvirliva.

### Skuldin veksur

Vadim Nepocrjtj sigur, at meðan hann er í Las Palmas uttan løn, veksur skuldin hjá honum í Ruslandi.

- Vit hava samskift við Bjarta Mohr síðani í mai og spurt hann, nær vit fáa løn. Hvørja fer fáa vit at vita, at tað verður skjótt, sigur Vadim Nepocrjtj við útvarpið hjá Kringvarpinum.



Bjarti Mohr, reiðari